## DAGSINS MEINING

# Samstarv

Nú hava vit tosað nógv um samstarvsvilja ella mangul upp á sama í samband við samgongusamráðingarnar. Tá nú valið er farið væl og virðiliga afturum, so sæst ein nógv meira hóvligur tóni partanna millum. Eisini sæst, at eitt nú Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru rættiliga samdir um nógv mál. Vit kunnu til dømis nevna privatiseringina av kongsjørðini, har Fólkaflokkurin vil nakað annað enn Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin.

Okkurt undantak er tó. Torbjørn Jacobsen vinnir neyvan nakra premiu fyri sakligheit og diplomati í sínum orðavavstri um sosialdemokratar, sviðar o.s.fr. Hvørjum endamáli slík skriving tænir, vita vit ikki, men hon minnir ikki sørt um skrivingina hjá Óla Breckmann fyri 20 árum síðani. Tíbetur er tað bert eitt fátal, ið skrivar so, og eru fólk flest ivaleyst vaksin nokk, at leggja persónligt agg til viks til gagns fyri konstruktivt samstarv.

Eitt annað øki, har andstøðan og partar av samgonguni, herundir serliga Tjóðveldisflokkurin, kunnu semjast um rættiliga nógv, er heilsuøkið. Bill Justinussen hevur havt onkrar undarligar orðingar um fosturtøkumálið og hevur hann nú eisini havt atfinningar móti bryggjaríunum. Neyvan man Tjóðveldisflokkurin kunna standa inni fyri politisku linjuni hjá Miðflokkinum, og tí er ringt at síggja, hvat eitt slíkt samstarv skal byggja á, nú fullveldi er slept í hesum valskeiðnum.

Tað er ein sannroynd, at vit nú aftur eru í heimastýrispolitikki, har ein yvirtøka verður framd her og ein onnur der, uttan tær heilt stóru armrørslurnar frá nakrari síðu. Fullveldi sum hugtak er lagt á hillina, og síggja vit aftur gamla vælkenda mynstrið, har flokkarnir á vinstraveinginum kunnu semjast um flestu mál. Hetta fara vit óivað at síggja, tá nú tingmál um privatisering av kongsjørðini og pensiónsmálið koma á borðið. Tjóðveldisflokkurin fer neyvan at hyggja at, meðan landsins ognir verða latnar nøkrum fáum. Fólk flest vita sum er, at eitt lyfti um onga spekulatión í dag hevur lítlan týdning um 30 ár, tá privatir hava átt meginpartin av Streymoynni í hesi 30 ár. Tá skulu vit nokk hoyra um "ejendomsrettens ukrænkelighed". Eisini má man vænta, at samhaldsfasti vongurin í tinginum fer at standa saman um eina pensiónsskipan eftir samhaldsføstum leisti, og ikki einum "hvør er sær sjálvum næstur" leisti, soleiðis sum Fólkaflokkurin vil tað.

Nú vinstra-høgra politikkur aftur er í eygsjón eftir 4 árum við lítlum øðrum enn loysing-samband, so hava vit góðar vónir fyri samstarvi tvørtur um samgongumarkið. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tøkk til SvF

**Tordur J. Niclasen**
*Eiði tann 23.06.02*



Heidi Andresan av Eiði, saman við fýra øðrum í hennara bólki, varð innstillað til "Laureus Word Sport Award" og hevði sostatt møguleikan fyri at verða kosin til heimsins besta ítróttarfólk í sínum bólki.

Bara tað, at verða vald út og soleiðis verða roknað millum heimsins bestu má sigast at vera stórhending í sjálvum sær.

At ein føroyingur nú taldist millum teirra, sum skuldi luttaka á hesi stevnu í Monaco, var ein heiður fyru tjóðina og mong mundu gleða seg til hesa løtuna 14. mei.

**Fólkið fekk lut í løtuni.**
Tað sum var hugtakandi og sera viðkomandi í øllum hesum sum hendi í Monaco, var, at SVF hevði fólk á staðnum.

SVF hevði eisini gjørt nakað burturúr, áðrenn Heidi og fylgi hennara fóru avstað

Mong mundu tey vera, sum í spenningi sótu frammanfyri skýggjan, tá Tórður Mikkelsen beinleiðis úr Monaco í Degi og Viku tann 14. mei greiddi frá.

Í Degi og Viku hóskvøldið 16. mei varð nógv gjørt burturúr og so aftur sunnukvøldi 26. mei har uml. 2 tímar vóru frá hátíðarhaldinum í Monaco.

Av hesum vóru ikki færri enn 20 minuttir um Heidi Andreasen og áhugaverdu ferð hennara.

Ein sera góð og hugtakandi sending, har Føroyar vóru umboðar í heimsklassa.

Ein sending, har løtan í Monaco varð flutt inn í hvørja stovu í landinum

Ein sending ,sum SVF eigur stóra tøkk fyri!

# Fallandi dópstal tekin um avkristnan

**John S. Myllhamar**



Onkur tók soleiðis til í sambandi við tíðindini, ið fjøldmiðlarnir bóru um fallandi dópstalið av børnum í Danmark: "Hetta er eitt gott tekin, sum vísir, at danir hava fingið rættan kristiligan hugsunnarhátt, ikki at lata børnini doypa, men lata tey sjálvi sleppa at velja, tá ið tey einaferð hava skil fyri hvat, tey vilja".

Men viðkomandi fer stórliga skeivur. Tíðindini eru als ikki tekin um, at kristindómurin hevur framgongd - tvørturímóti. Er tað nakað, sum bendir á, at danir eru í ferð við at venda aftur til tey kristnu lívsvirðini? Opiniónskanningar, sum av og á verðar gjørdar í Danmark, tala ikki fyri, at kristindómurin er hátt í metum. At færri og færri lata børn síni doypa og læra upp í kristiliga barnalærdóminum, vísir best lága barometurstandin.

Í Føroyum lata so at siga øll fólkakirkjulig foreldur børn síni doypa. Tað gevur seg eisini til kennar í, at guðstrúgvin støðugt situr føst í mongum føroyingum. Vist er tað, at um teir dagar koma, at dópstalið av børnum í Føroyum fer at fella, verður tað ikki ein ábending um at kristindómurin hevur framburð, men eitt sjúkratekin, sum avdúkar avkristnan.

# Strámannavirksemi og lobbyarbeiði føroyinga!

**Hans Birgir Hansen/**
**Mr. Big**

Eg eri ógvuliga hart ímóti øllum skipa strámannavirksemi og lobbyarbeiði ið gongur fyri seg aftan ryggin á vanligum føroyingum, hvat vit sóu við fiskiloyvum!

Tað eru landasvíkjarar, quislingar, tá valdstystandi føroyingar aftan fyri ryggin á vanligum føroyingum føra seg fram sum eiga teir oyggjar, firðir, havumhvørvi!

Eg fái andstygd tá ein sær hvussu valdstystandi føroyingar bera seg at mótvegis sínum egnu landsmonnum, ið ein gevur av grovfíluni í lesarabrøvum í bløðunum!

Tað kann ikki vera rættvíst at grannatjóðir okkara á slíkan hátt skulu fáa loyvi at keypa seg inn í føroyskt vinnulív, meðan føroyingar verða hildnir uttan fyri!

Eg vil hava blaðlesarar alment at gera vart við seg í bløðum og kjaki úti ímillum manna og tala at landspolitikarar hava ein týðandi leiklut í slíkum í dag!

Tað kann ikki vera rættvíst at valdstystandi innan tær svørtu afturhalds/stórkapitalistisku/fríu marknaðarkreftir skulu stýra øllum tí politiska lívinum í dag!

Eg komi framhaldandi at fylgja øllum tí, skriva upp og havi fleiri rámandi avdúkingar, ið hava fingið arvafíggindar at ignorera ein í tí dagliga gerandislívinum!

Tað er ein samfelagsskylda ið ein røkir tá ein gevur øllum innlit/forstáilsi/tilvitan/eingin fær frá teimum/ valdstystandi, innan omanfyri nevndu kreftir ídag!

Eg vil steðga strámannavirksemi og lobbyarbeiði, ið alment skal avdúkast tað ongantíð ovskjótt og at vit vanligir føroyingar kunnu keypa rætisrættindini í dag!

Tað gevur úrslit at stríðast ímóti øllum, tá ein kennir baklandið og hugsjónir og hugburðir og málburðir, ið ein viðger í túsundtals lesarabrøvum í bløðunum!

Eg síggi, at alt tað ein hevur stríðst fyri síðan seinast í sjeytiárunum vinnur almennan, politiskan frama!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# 3. flokkur úr Leirvík vitjaði Sosialin



*Næmingarnir í 3. flokki í Leirvíkar Skúla inni á fotodeildini á Sosialinum, har myndamaðurin vísti teimum, hvussu myndirnar verða tilgjørdar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SKÚLAVITJAN
*Eirikur Lindenskov*

Týsmorgunin var 3. flokkur í Leirvíkar Skúla á vitjan á Sosialinum.

Nú tey skjótt fáa summarfrí, vóru tey farin ein túr til Havnar. Veður hevur ikki verið til at fara burtur í haga, so tey valdu í staðin at vitja í høvuðsstaðnum.

Eftir at hava sæð, hvussu Sosialurin verður gjørdur, fóru tey niðan í Gundadal at svimja. Síðani skuldi tey vitja á Prentmiðstøðini, har Sosialurin verður prentaður – og síðani í Norðurlandahúsið, har tey skuldu fáa sær ein bita.

# Jóansøka á Suðurrás

**Leygarkvøldið fer útvarpsrásin Suðurrás at senda frá jóansøku. Hetta verður fyrsta sendingin hjá nýggju rásini í Suðuroy**

ÚTVARPSRÁS
*Stefan í Skorini*



Á jóansøku, sum verður komandi vikuskiftið, fer tann nýggja útvarpsrásin í Suðuroy at senda á fyrsta sinni.

Lagt verður til brots nakað tíðliga, av tí at jóansøka er á skránni, men ætlanin er annars at senda regluliga seinni í ár.

Í løtuni verður gjørt klárt í hølunum í Vági, og útvarpsmenninir fyrireika sendingarnar, sum skulu vera á stevnuni. Rásin er sjálvstøðug, men samstarvar við Útvarp Føroya um sendingar. Sent verður á netinum hjá ÚF leygarkvøldið.

Vertir í sendini verða Jákup Magnussen og Dagfinn Olsen, sum hava arbeitt innan fjølmiðlaheimin. Knýttir at sendingini á onkran hátt verða eisini Dennis Holm, Búi Dahl og Djóni Eidesgaard. Bjarni Johansen verður teknikari.

Sendingin, sum fer at bera heitið jóansøka á Suðurrás, verður frá klokkan 20 til 22 leygarkvøldið. Á skránni verður prát við gestir og livandi tónleikur.

Fyrireikararnir siga, at enn er óvist, nær rásin fer at senda regluliga, men startskotið verður leygarkvøldið.

# Skipafelagsbátarnir altjóða góðkendir

**Farmaskipini Blikur og Lómur hjá Skipafelagnum fingu herfyri altjóða trygdargóðkenning, tað sonevnda ISM certificatið**

TRYGD
*Edvard Joensen*

Farmaskipini hjá Skipafelagnum Føroyar eru nú ISM góðkend. ISM stendur fyri International Safety Management.Talan er um altjóða trygdargóð-kenning, sum kravd er frá 1. juli í ár.

Odmar Hansen á Skipafelagnum sigur, at støðan er stutt og greitt tann, at tað farmaskip, sum ikki hevur hesa góðkenning tann 1. juli í ár, verður lagt.

Frammanundan hava bæði ferðamannaskip og tangaskip hesa góðkenning. Fyri ferðamannaskipini kom hon í gildi í 1996, og fyri tangaskipini tvey ár seinni í 1998. 1. juli í ár er túrurin so komin til farmaskipini, og allur handilsflotin er sostatt ISM góðkendur.

Tað er klassin, sum stendur fyri certificeringini, sigur Odman Hansen. Hjá Skipafelagsbátunum er tað Norske Veritas í Føroyum, sum klassar.

Tað, sum hendan certificeringin í høvuðheitinum gongur út uppá, er at festa niður á blað allar teir arbeiðshættir, ið longu verða nýttir umborð.

– Sum so merkir tað onga broyting í gerandisdegnum umborð, sigur Odmar Hansen. Útgerðin er so at siga tann sama. Onkrar bøkur og okkurt annað smávegis soleiðis er komnið afturat. Í aðrar mátar hevur trygdin verið so góð umborð, at nøkur stórvegis broyting fer ikki at merkjast í gerandisdegnum, hóast nú stendur á pappíri, hvussu farast skal fram.

Skipafelagið Føroyar eigur skipini Blik og Lóm, sum sigla í fastari rutu millum Føroyar og Danmark. Umframt leigar Skipafelagið eisini danska farmaskipið Sea Lion.



*Skipafelagsbátarnir eru nú ISM góðkendir og lúka altjóða trygdarkrøv*

Familju- og trivnaðarmálaráðharrin:

# Vil steðga ølsøluni hjá bryggjaríunum

**Ølsølurnar hjá teimum tveimum bryggjaríunum í Føroyum forpesta nærumhvørvið í ávísum bygdum og byum og eiga at verða niðurlagdar, heldur nyggi ráðharrin við familju- og trivnaðarmálum**

ØLSØLA
*Rúnar Reistrup*

Bill Justinussen, familju- og trivnaðarmálaráðharri, er ikki fegin um tað brotið í rúsdrekkalógini, sum gevur bryggjaríum heimild til at selja egnar vørur frá goymslum sínum. Hann vil snøgt sagt hava tað burtur, soleiðis at Rúsdrekkasøla Landsins verður einasta sølustað fyri rúsandi løgir.

Í samrøðu í seinastu útgávu av Blákrossblaðnum sigur Bill Justinussen, at sølurnar hjá byrggjaríun um forpesta nærumhvørvi, har tær eru, og eru við til at økja um misnytsluna av rúsdrekka.

Hann vísir á, at eitt av endamálunum hjá nyggju samgonguni er at økja um trivnaðin og minka um rúsmisnytsluna, og tí er tað heilt greitt, at sølurnar hjá bryggjaríunum eiga at verða niðurlagdar.

Familju- og trivnaðarmálaráðharrin vísir í sama viðfangi á, at tað eftir hansara tykki eingin orsøk er til at nútímansgera rúsdrekkalógina til ferðavinnuna, tí, sum hann sigur við Blákrossblaðið, at um ein ferðamaður ikki kann klára seg uttan rúsdrekka í nakrar dagar, so hevur hann ein trupulleika, og ikki vit.